# mmiríki í Æðuvík





Einasti hani í høsnarhúsinum í dag er 82 ára gamli, ella ungi, **Justinus Háskor**, sum er ættaður úr Svínoy, men flutti til Havnar í 1942. Hann arbeiddi sum timburmaður og rørsmiðjur, og hevur verið einkjumaður í 20 ár. Hann var eisini við í Æðuvík í gjár, og letur eins væl at og damurnar. Spurdur, hvussu verður á jólum, sigur hann seg rokna við, at hann fer heim til sonin. Og jú, summar av damunum duga bara væl at gogga, men best eru kríatúrini, serliga hundurin, sum hann er so sera góður við.

Her situr 92 ára gamla **Hansina Mortensen** úr Famjin. Hon hevur verið einkja í 20 ár, og hevur ikki færri enn 31 langommubørn og eitt oldurommubarn. Sjálv er hon níggjunda barnið í einum systkinaflokki á 16, harav 4 enn eru á lívi. Um jóltíðir minnist hon altíð aftur á eina syrgiliga hending suðuri í Famjin, tá hon var bert 12 ára gomul. Tað var tá ið ein eingilskur trolari fór upp á land í allari tokuni.
- Eg gloymi ongantíð sjónina av hesum tólv monnunum, sum lógu og flutu í sjónum rundan um skerið. Tað var nakað so forferdiligt. Onkur segði, at skiparin skuldi giftast á jólum, men hann kom ongantíð heim til Onglands aftur, forklárar Hansina, sum er púra klár, men er nakað besverað av gikt í hondini og í beininum, og tí hevur eitt gangistativ at halda seg til.





**Anna Elisabeth Vang**, ella **Lillan**, er 90 ár. Hon hoyrir illa, og vit báðar royna sum best at fáa eina samrøðu í lag. Hon hevur nógv upp á hjarta, og er ein sjarmerandi dama. Spurd, hvat hon gjørdi, tá ið hon var yngri, sigur hon hart og týðuliga:
- Eg dansaði og ballaðist! Og øll eru um at skrædna – eisini hon sjálv.
- Vit dansaðu til Gogguna í Sjónleikarhúsinum og í Tórshøll, sigur Lillan, vendir sær móti einum starvsfólki og mussar hana brosandi á kjálkan.
- Maður mín var Magnus Vang, Hann var maskinmeistari og skipari og doyði fyri 20 árum síðani – og eg havi ongan havt síðani, sigur hon, og aftur flenna øll í kíki. Jú, her er sanniliga lív í millum tey gomlu.
- Men tað mesta er lygn, minnir hon á til endans.

**Hilda Sandoy** er heiman av Sandi. Hon er sjúkrasystir og hevur arbeitt á medisinskari deild í mong ár, millum annað saman við Jonu Joensen, sum eisini býr á sambýlinum og situr í rullistóli. Meðan vit práta, situr Jeannie, sum arbeiðir á sambýlinum, tætt hjá Hildu og heldur henni í hondini. Og vit tosa um hetta við, at ein sjúkrasystur altíð er sjúkrasystur.
Í gjár var ein serligur dagur í sambýlinum, tí tá fóru nøkur teirra túr til Æðuvíkar, har tey sóu alt jólapyntið. Aftaná var jólahugni fyri teimum níggju búfólkunum og familjum teirra á sambýlinum, við lekrum jólamati, alskyns góðgæti, sangi og klaverspæli fyri teimum nærum trýss gestunum.
- Hetta var ein sera góður dagur, sigur Hilda.



**Kristina Nikodemussen** er 92 ár og kennir okkum á Sosialinum eitt sindur. Tí, sum hon greiðir frá, so er hon omma Niels Una Dam, sum arbeiddi hjá okkum til fyri stuttum. Kristina er eisini systir Sofus Olsen, sum læt listasavnið til Sands bygd, og sum doyði í fjør. Hon fortelur, at hann hevði fylt 94 ár í dag, var hann á lívi, og at hon iðrar seg eitt sindur um, at hon ikki kundi vera til staðar á listasavninum í gjár, tá ið hátíðarhald var har.
- Men tað verður helst víst í sjónvarpinum eisini, sigur Kristina, sum hevur búð í sambýlinum í 1½ ár.



12 starvsfólk arbeiða á sambýlinum – men hetta eru tey, sum eru til arbeiðis í dag. Frá vinstri: Asta, Gunnvør, Axelina, Tórhild, Jeannie og Heiðveig.